**Suðuroyar Ellis- & Røktarheim**
**800 Tvøroyri**

# Skrivstovufólk

Vegna farloyvi verður søkt eftir skrivstovufólki til fulltíðarstarv í tíðarskeiðnum 1. januar til 31. juli 2005.

**Starvslýsing**
Í høvuðsheitinum umfatar starvið skrivarauppgávur fyri leiðsluna. Starvið umfatar eisini sjúklingaskráseting, toll- og telefonavgreiðslu, skjalasavn og hjálp í bókhaldinum.

**Førleikakrøv:**
Tað er fyrimunur, at tann,ið settur verður, hevur skrivstovuútbúgving ella líknandi. Eisini skal viðkomandi hava kunnleika at arbeiða við teldu, verða fyrikomandi, arbeiðssamur og kunna arbeiða sjálvstøðugt.

**Setanartreytir:**
Løn og setanarviðurskifti, ið er treytað av starvsroyndum og útbúgving, eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Suðuroyar Sjúkrahús, Arnhild Tausen tlf. 371133.

**Umsóknir:**
Skrivlig umsókn við avriti av prógvum v.m. verður at senda til:

**Umsjónarmannin**
Suðuroyar Sjúkrahús
FO-800 Tvøroyri

**í seinasta lagi 15. desember 2004.**

# TIL SØLU | MERCRUISER BRAVO II

drev til dieselmotor
við dupultum
regulatorum kmp



Bert brúkt 650 tímar

TEL 222 817

# Suðringar

Um tit vilja hava gravsteinin málaðan av nýggjum ella nýtt navn skal setast á steinin. So eru vit í suðuroy hósdagin, fríggjadagin og leygardagin í viku 50 og heinta steinar.

**Sp/f Basalt**
**Tlf. 211661-211662**

Gallarí Jinx

Pernille Heinesen

Sýnir fram myndir av skræðu
og stoffi, í desember mánaði

tel 317101 • jinx@jinx.fo

Sosialurin 341800

# Skattalistin
**fyri 2003**

Skattalistin ár 2003 fyri Tórshavnar kommunu liggur frammi til alment eftirlit frá týsdegnum 7. desember til týsdagin 21. desember 2004, báðir dagarnir íroknaðir.

**Skattalistin fyri Tórshavnar kommunu**
liggur frammi í Snarskivuni á Vaglinum, allar gerandisdagar frá kl. 9.00 til kl. 16.00, tó hósdagar til kl. 18.00.

**Skattalistin fyri Kollafjørð**
liggur frammi í handlinum hjá Carl August Jensen frá mánadegi til hósdag kl. 9.00 til kl. 18.30, fríggjadag til kl. 20.00 og leygardagar kl. 09.00 til kl. 14.00.

SNARSKIVAN
www.torshavn.fo

# Starvsfólk til verkætlan

Serstovnadeildin søkir eftir starvsfólki til eina verkætlan á Eirargarði 16 BS, skjótast gjørligt. Talan er um at arbeiða niðursetta tíð, við skiftandi vaktum og arbeiði í vikuskiftum og halgidagar. Tey, sum kunnu søkja starvið, eru pedagogar, sjúkrarøktarfrøðingar, heilsuatstøðingar og pleygarar. Neyðugt er at hava royndir innan psykiatriksa øki.

Uppgávan er at stimbra og stuðla í fyrsta lagi einum brúkara, sum annars klárar seg sjálvan í gerandisdegnum.

Starvið verður lønt samnart sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Starvið er í fyrsta umfari tíðaravmarkað til 1. apríl 2005. Meira fæst at vita við at venda sær til Annu Johannesen, tlf. 215540.

**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Sjúkrarøktarfrøðingur, pleygari/-heilsurøktari

Fulltíðar farloyvisstarv sum sjúkrarøktarfrøðingur, pleygari/heilsurøktari í skiftandi vaktum á D2 er leyst at søkja til setan frá 1. januar 2005 og til og við 30. september 2006.

Deildin er ein akut viðgerðardeild. Á deildini starvast sjúkrarøktarfrøðingar, pleygarar og heilsu-røktarar. Deildin er ein áhugaverd deild við nógvum avbjóðingum. Vit raðfesta samarbeiði og trivna høgt, og at starvsfólkið er í støðugari menning og arbeiða áhaldandi at betra um terapeutiska umhvørvið á deildini.

Arbeitt verður eftir kontaktpersónaskipanini og miljøterapeutiskum meginreglum. Deildin hevur tætt samstarv við aðrar fakbókar, baði innan- og uttanhýsis.

**Setanartreytir:**
Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

**Upplýsingar um starvið:**
Meira um starvið fæst at vita um við at venda sær til Birgit Andersen, deildarleiðara á D2 tlf. 304500, lokal 4002 ella til Bergit Weihe, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 4102, ella e-post bergitw@lsh.fo

Umsóknarfreistin er 21. desember 2004 kl. 12.00.

Skrivlig umsókn, merkt »umsókn til starv« við avriti av prógvum, CV og viðmælum e.l. skal sendast til

**Landssjúkrahúsið**
Lønar- og starvsfólkadeildin
FO 100 Tórshavn

*Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um størv við at klikka á leinkjuna »starvsfólk«*

# Kunngerð

**frá útskiftingarnevndini fyri Uppsalahaga í Klaksvík**

Útskiftingin uttangarðs av Uppsalahaga, Klaksvík varð endað við úrskurði sagdur á fundi í Klaksvík 26. november 2004. Hesin úrskurður varð latin til ákæru frá saman degi sbrt. kap. 9 í útskiftingarlógini frá 27. mars 1939.

Møguligar kærur skulu vera skrivligar og stílast til Yvirútskiftingarnevndina, Sorinskrivaran, C. Pløyensgøta 1, Tórshavn. Kærufreistin er 3 mánaðir frá 26. november 2004.

Útskiftinarskjølini liggja frammi hjá kommununi í Klaksvík, og á Matrikulstovuni í Tórshavn, tí kærufreistin er úti.

**Øssur Á. Midjord**
útsk. form.